


tá hann fer á pall hóskvøldið í "grundini" saman við WeAreSkitzo.

**WeAreSkitzo (DK)**
WeAreSkitzo hevur verið partur av náttarlívinum í Keypmannahavn síðan 2008 við einum stíli, sum skiftir millum tekno, fidget, dubstep, disko, corny classix og nógv annað.Endamálið er tó altíð tað sama: at gera eina so ógvusliga veitslu, at mann skuldi trúð, at eingin morgindagur var!

**Copyflex (DK)**
Copyflex føddist, tá hesin ungi maður og bólkur hansara skuldu spæla eina live konsert í 2005, og øll útgerðin hjá teimum brádliga breyt saman. Tá var liðugt við ófantaligum ljóðførum: diskingin var einasta svarið. Síðani 2005 hevur Copyflex staðið á palli saman við kendum tónleikarum og diskarum sum Trentemøller, Camille Jones, Jens Fokking, Diplo og mongum øðrum. Hóskvøldið fer hann á pallin í "grundini" saman við Afrokid at vísa okkum, júst hví hann fór frá live tónleikinum og yvir til at diska.

**Páll Finnur Páll**
Argandi og fúlir, men við fittum og íoyrafallandi løgum, finna Páll Finnur Páll pall á G! Summi gerast glað, summi óð, men flestøll blíva rivin við av fangandi poppløgunum hjá bólkinum. Hóast summi bæði øtast og øsast av tekstunum, so hevur Páll Finnur Páll megnað at fáa fólk at síggja skemtið í tí tragiska og andstyggiliga, sum teir syngja um í popputum og fittum løgum. Páll Finnur Páll er seinastu árini farin frá at vera eitt meinaleyst studentaorkestur til at gerast kanska best dámdi føroyski bólkur í teirra ættarliði.

**Moto Boy (SE)**
Einsamallur á pallinum við einum heavy-metal-sligum V-gittara og alt ov væl smurdum andliti ger Moto Boy uppreistur. Ikki við at rópa og skrála. Men við at skapa og framføra sera vakran tónleik ordiliga friðarliga. So friðarliga og vakurt, at tú verður sogin inn í tónleikin. Tónleikurin hjá Moto Boy er skammleyst romantiskur, djúpt andaligur og fullkomiliga bergtakandi.

**Polkabjørn & Kleine Heine**
Úr Romsdalinum í Noregi, umvegis Alpurnar í Sveits, kemur fremsta jodli-duoin í Evropa, Polkabjørn & Kleine Heine. Eftir at hava spælt í ávíkavist punkbólkinum The Barfing Bitch and the Hurling Hookers from Hell og jazzharkaliðinum hjá Ola Kvernberg, byrjaðu Polkabjørn og Kleine Heine alment at jodla saman á einum jodlifestivali í Alpunum. Síðani tá hava teir spælt fyri bæði kongi og øskudólgi.

**FM Belfast (IS)**
Tað sigst, at øll í Klaksvík elska Bon Jovi, og at øll í Gøtu elska U2. U2 eru, sum vera mann, úr Dublin. Dublin er høvðusstaðurin í Írlandi, meðan Belfast er høvuðsstaður í Norðurírlandi. FM Belfast er ein tann allar best umtókti og mest umbidni íslendski bólkurin í løtuni. Bólkurin spælir electroniskan, naivan og skemtilligan tónleik, sum ljóðar sjarmerandi heimagjørdur. FM Belfast byrjaði sum ein duo um jóltíðir í 2005, tá Árni og Lóa gjørdu eitt lag sum eina gávu til ein av teirra vinum. Tað, sum upprunaliga var eitt studioting, gjørdist síðani ein bólkur á sumri í 2006, tá Árni og Lóa framførdu til eina listasýning í gjónni við Gjógv. Bólkurin hevur síðani vunnið sær støðu sum ein av fremstu bólkunum í Íslandi.

**Hamferð (FO)**
Vinnarin av Sement-kappingini, Hamferð, verður at hoyra á G!

**Hallur Joensen**
Ráðandi countrykongurin í Føroyum í løtuni er Hallur Joensen. Hallur spælir á G! Festival, og tað merkir, at fólk fara at svinga til kendar tónar. Tað er ikki bara í Føroyum, at fjepparar fylkjast um Hall. Eisini hava útvarpsstøðir bæði í Japan og ymsastaðni í Evropa valt at seta løg og útsetingar hjá ráðandi føroyska countrykonginum í umfar. G! Áhoyrarar kunnu gleða seg til ektaðan og hjartaligan country-sang, sum hevur bæði beinini plantað væl á jørðina og sum samstundis svingar, so tað ikki ber til at standa ella sita stillur.

**Analog Norð**
Hóast Analog Norð er ein bólkur, so er fløgan "Friendly Fire" barnið hjá runavíkinginum, Jan Rasmussen. Einsamallur sat Jan Rasmussen í samfull tvey ár frammanfyri telduni og arbeiddi nátt og dag uppá tað, sum seinni skuldi gerast ein heilskapað útgáva við 12 løgum. Við hjálp frá vinmanninum Kristoffer Mørkøre, ið ljóðblandaði løgini og legði ymiskt annað aftrat, gjørdist "Friendly Fire" veruleiki seint á heysti 2009 og var í sølubúðunum í desember mánaði. Fløgan er róst til skýggja, og løg av henni eru nógv at hoyra í føroysku útvarpsrásunum, serliga "China Girl", "The High Road" og "Old School". Eftir at "Friendly Fire" varð útgivin, savnaðu Jan og Kristoffer fólk til bólkin Analog Norð, ið skuldi framføra løgini live.

**FRÓDI & The Pink Slips**
FRÓDI & The Pink Slips kallast nýggi bólkurin hjá Fróða Hansen, sum gevur eina spildurnýggja EP út á sjálvum G! festivalinum. Fróði gav annars sína fyrstu fløgu "Creeping Storm" út farna summar og hevur síðani verið sera virkin sum tónleikari síðani, serliga í Keypmannahavn, har hann býr í løtuni. Hann er annars beiggi Guðrið Hansdóttir, ið eisini spælir á G!

**Sakaris fyri fyrstu ferð live – á G!**
Eftir at hava verið partur av bólkum sum Lama Sea, HEIÐRIK, Guðrið Hansdóttir, The Story Ends og Boys in a Band hevur 23 ára gamli Sakaris Emil Joensen nú ment sína egnu elektro-verkætlan, SAKARIS, sum fer at framføra live fyri fyrstu ferð nakrantíð í "grundini" á G! Fyri stuttum gav SAKARIS út ókeypis netútgávuna "Darling EP" við MESS. Lagið "In a Box" gjørdist beinanvegin stóra sólskinshittið í loftmiðlunum hetta summarið og verður nú at hoyra live fyri fyrstu ferð leygarkvøldið.

**Brandur Enni**
Eitt tónleikaligt flogvit og eitt einastandandi natúrtalent. Vit tosa um sangaran, tónleikaran og lagskrivaran Brand við eftirnavninum Enni. Brandur Enni er harafturat eisini eitt eindømi á føroyska tónleikapallinum, har hann var fyrsta veruliga poppfyribrigdið, ið er skapað í Føroyum. Hann byrjaði at syngja longu sum tvey ára gamal, gav sína fyrstu plátu út, tá hann var 12 ár og gjørdist beinanvegin eitt húsarhaldsnavn, bæði í Føroyum og Íslandi. Í dag er barnastjørnu-tilveran ein fjar fortíð. Brandur Enni hevur væl og virðiliga vindblást seinasta barnastjørnu-dúnið av sær og stendur tryggur á egnum listarligum beinum.

**Lyon (FO)**
Ungi gøtumaðurin Lyon kom brakandi inn á føroyska tónleikapallin fyri fáum vikum síðani, tá hann við eini bergtakandi framførslu kom víðari í Sement finaluna og har vann sær eitt pláss á palli á G! Festivalinum 2010. Við gittara, klaveri, ronkum ryggi og væl sitandi hatti borðreiðir Lyon við mest karismatisku framførslunum, tú kanst ímynda tær. Sangskrivarastílurin hevur eina heldur ótraditionella ljóðmynd, serliga í føroyskum høpi, og leggur hann seg yvir í Tom Waits sjangruna við einari kenslu av Jeff Buckley.

**Arch Enemy (SE)**
Svenski bólkurin Arch Enemy er uttan iva størsta metalnavn, sum hevur verið á G!. Bólkurin hevur eina heilt serliga støðu innan metaltónleikin. Fyri tað fyrsta eru tey kend sum ein av best spælandi metal-livebólkunum, fyri tað næsta munnu teir báðir øksabrýnandi Amott-brøðurnir verða mettir millum fremstu metal guitaristarnir, eins og Sharlee D'Angelo og Daniel Erlandsson eisini eru legendariskir á tungmálms-pallinum. Men tað sum eygu og oyru festa seg við fyrst er also Angela Gossow, ið sær út, sum er hon tikin úr eini norrønari gudasøgu, brotin úr gløðandi málmi, brúsandi sum brim og strálandi sum sólin á hægsta summari.

**Eivør Pálsdóttir**
Øll elska Eivør. Vit hava fylgt henni upp á tindar og ígjøgnum dalar.Tað hevur glett tjóðina at síggja, hvussu væl tað hevur gingist henni uttanlands, har hon hevur sópað heiðurslønir og lovorð inn frá bæði høgru og vinstru. Næstan á hvørjum ári hava vit sæð menningina og kunna gleðst við henni, meðan hon hevur borið fram tað besta hon hevur átt. Vit minnast hana heilt afturi frá Clickhaze-døgunum, ið enn standa sum ein varði fyri føroyskan tónleik og sum settu gongd á eina menning, sum er í besta blóma.

**The Ghost**
Mangt gátu- og dularfult finst ímillum himmal og jørð. Men hóast bólkanavnið, The Ghost, kundi bent á eina tilveru í tí dulda, so kávast og goymast avrikini hjá teimum báðum, Filipi og Urbanusi í The Ghost, ikki. Teir hava arbeitt sum úlvar á skóg, nátt og dag, dult og opið, hesi seinastu árini fyri at fáa fótin fastan sum bólkur í og uttan fyri Føroyar.

Kelda: www.gfestival.fo